

## Gunnar og Atli spældu við

Gunnar Nielsen vardi málið, og Atli Danielsen spældi á miðvøllinum, tá ið danska 1. deildarfelagið Frem spældi venjingardyst ímóti Holbæk leygardagin. Einki mál kom í dystinum, hóast Frem hevði nógva av spælinum. Gunnar Nielsen hevði ikki tað stór at gera, men var til reiðar, tá ið okkurt var. Atli Danielsen spældi á miðvøllinum so at siga allan dystin. Hann var uttanfyri einar fimm minutti fyri hálvleikssteðgin við einum minni løsti, men spældi allan seinna hálvleik.

## Frem við føroyskari yvirskrift

Danska fótbóltsfelagið Frem hevur sum nógv onnur feløg eina heimasíðu, har tíðindi um felagið verða borin. Í løtuni er ein av yvirskriftunum á føroyskum. "Venjingarlega í La Manga i Spania" stendur á forsíðuni. Í greinini verður so greitt frá á donskum, hvat yvirskriftin merkir, og tað verður staðfest, at nýggi spælarin hjá Frem, Atli Danielsen, skal á venjingarlegu við føroyska landsliðnum á La Manga í februar mánaði.

## Liðandin var tann rætti

- Júst nú er hetta besti dystur nakrantíð hjá okkum.

Soleiðis segði Joan M. Djordjevic hjá Stjørnuni, tá vit fingu orðið á hana eftir sigurin í finaluni í Coca Cola-kappingini ímóti Stjørnuni. Eins og venjarin helt hon, at betra liðið vann dystin henda dagin.

- Í dag vístu vit, at vit hava eitt betri lið enn tær. Vit høvdu ein sovorðnan anda á liðnum í dag, sum vit ikki hava sæð í langa tíð, og hetta hava vit saknað. Vit hava mangan verið á odda fyrr, men so mist leiðsluna í síðstuminuttunum, men í dag er eingin ivi. Vit koma á odda, og vit megna at halda leiðsluni allan vegin.

Vit hava mangan sæð, at tá lið vinna steypakappingini, so steðga tey eitt sindur upp í landskappingini, men hetta væntar Joan ikki av Stjørnuni í ár.

- Í kvøld skal hetta bara feirast, men eftir hetta skulu vit bara koyra á í landskappingini, sum vit hava koyrt á síðstu dystirnar. Ætlanin er nevniliga at vinna bæði steypakappingina og landskappingina í ár, segði ein stórsmílandi Joan. M. Djordjevic.

**-teitur**

Stjørnan-VB 31-28 (16-11):

# Tryggur favoritt-sigur



**Hóast tølini kundu bent á ein hampuliga spennandi dyst, so var spenningurin ikki tann heilt stóri í kvinnufinaluni. Tí hóast VB royndi at spæla sín møguleika, so var styrkismunurin ov sjónskur**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fleiri av áskoðarunum hjá VB høvdu hug at illneitast á Stjørnu-venjaran, tá kvinnufinalan longu byrjaði. Longu frá fyrsta bríksli hevði hesin nevnliga gjørt av at mansverja Daivu Toumaite, sum í fleiri ár hevur verið roknaður sum kanska allar besti kvinnuligi spælarin í Føroyum.

Og tað var so eingin ivi um, at skuldi VB gera nakrar skreytir móti favorittunum úr Stjørnuni, so kravdi hetta stórspæl frá Daivu. Henrik Gerster hevði ongan hug at geva VB hendan møguleikan, og tí varð avgerðin um mansverju tikin alt fyri eitt.

At onkur so hevur hug at kalla hetta fyri ein primitivan hátt at steðga mótstøðuni, man Gerster sum so vera hampuliga líkasælur um. Og heldur ikki mundi hann leggja stórvegis í róp-ini, sum av á og kundu hoyrast úr norðaru áskoðaraplássunum í høllini, har flestu VB-viðhaldsfólkini sótu. Fram um alt, so vildi Stjørnan ikki uppliva eina endurtøku av støðuni fyri einum ári síðani, tá liðið – hóast greiðan favorittleiklut – tapti fyri Neistanum.

### Ov fáir streingir

Mansverjan av Daivu var eisini greitt tekin um, hvør størsti veikleikin hjá VB er. Uttan Daivu hevði liðið nevnliga alt ov fáar streingir at spæla uppá. Eina løtu tóktist Gurið Mortensen at halda liðnum í dystinum, og tá hetta ikki gekk longur, kundi Irina eina løtu geva Daivu nakrar góðar innspælingar, tá stórskjúttin ferðaðist inn á strikuna, men tað var alla tíðina so, at vágskvinnur tivaðu aftan á Stjørnuni.

Tær royndu at spæla sín møguleika, og eina løtu gekst eisini væl í so máta. Men tá tær so eisini misnýttu tveir uppplagdar møguleikar og tvey brotskøst, kundi bara ganga skeiva vegin.

Sum hálvleikurin leið, so gjørdist fjarstøðan millum liðini alt størri, og tá farið varð til hálvleiks, sat áskoðarin við kensluni av, at talan væl kundi gerast um rættiligt sorl.

### Góvust ongantíð

So galið gekst tó ongan tíð hjá VB kortini. Og tað vóru tað sum so tvinnar orsøkir til.

Onnur var, at spælararnir á liðnum alla tíðina spældu fyri sínum møguleika. Serstakliga var tað imponerandi at síggja Una Egilsdóttir og Svava Vestergaard, ið veruliga tóku ábyrgd á seg, og tó at teimum enn restar nakað í, áðrenn tær raka støðið hjá royndu landsliðsspælarunum hjá Stjørnuni, so sýndu tær heilt greitt, at knotur enn eru í VB-liðnum.

Hartil hevur VB so sanniliga ein av landsins bestu málverjum. Asta kundi illa